# Prosjekt Føroyar - tilve

Tað man gerast alt sjónligari fyri bæði leik og lærd, at tilverugrundarlag føroyinga er í vanda. Fiskivinnan og tað almenna kann helst effektiviserast munandi, men hvat skulu vit brúka leysgivnu orkuna til?

Í løtuni er tað javnaðarflokkurin, sum politiskt fær toyggið – í morgin verður tað onkur av hinum flokkunum. Tí trupulleikin er ikki í einum einstøkum flokki. Trupulleikin er, at tað er ikki serliga einfalt at víðka um tilverugrundarlagið fyri føroysku tjóðini, sum helst er væl minsta serstaka tjóð við einum av heimsins hægsta livistøði.

**Kann vera, at stuðulin úr Danmark kann linna búskaparligu pínuna eitt sindur eina løtu, men skal ein slíkur stuðul gerast okkara tilverugrundarlag frameftir, skulu heilt aðrar upphæddir til – og spurningurin er tá, hvussu nógv okkara hava eitt slíkt ynski.**

Veruleikin í dag er, at argumentini til frama fyri at velja Føroyar í ungum árum gerast alt færri, og argumentini gerast alt fleiri at velja Føroyar frá hjá fólki, sum veruliga kunnu dugna Føroyum.

Spurningurin fyri fólk, sum kunnu dugna Føroyum, er, hví skulu tey tað? Hvat skal fáa tey at velja Føroyar? Og vit kunnu bert hyggja eftir tí, vit bjóða onkrum av teimum, sum hava lagt lív sítt í hetta, at dugna landi og fólki.

Nógv verður tosað um, at fáa útlendskan kapital, útlendsk skip, útlendsk ferðafólk. Hetta er tos um slíkt, sum viðkemur útlendskum initiativi. Slíkt hevur ongan strategiskan áhuga fyri tilverugrundarlag Føroya.

**Uppgávan liggur fyrst og fremst í Føroyum, millum teirra, sum hava valt "prosjektið Føroyar".**

## Gerandisdagurin og "Møsnará"

Sæð við strategiskum eygum er føroyska tjóðin í dag kloyvd í smáar oyggjar, sum allar liggja úti í "Møsnará", har ein stríður streymur av møsni ger tað ómøguligt at kalla at samskifta um nakað líkinda strategiskt átak, tíansheldur at samskipa eitt slíkt og fáa tað til høldar. Vit kunnu eisini brúka myndina eitt "strategiskt kyksendi". Tess meira vit sparka, tess djúpari søkka vit.

Leiðsluteknisk hava vit ein setning, sum sigur: "Et ledelsesproblem har man, når der er ubalance mellem mål og midler og/eller mangel på kendskab til deres sammenhæng." (E. Johnsen, 1992). Fullveldislandsstýrið 1998-2004 setti tjóðini kós, men tjóðin gjørdist bert minni sjálvbjargin. ABC samgongan fyrra 2004-8 setti kós ímóti "Visión 2015", men tjóðin hevur neyvan verið meira "visiónsleys" enn tað sama í nýggjari tíð. At eingin javnvág er millum stevnu og politiskan vilja, kunnu vit helst semjast um. Nógv bendir á, at kunnleikin um eina slíka javnvág eisini er smáligur.

Í gerandisdegnum kann ein og hvør okkara tí dugna prosjektinum Føroyar við at leggja løðarsteinar út í "Møsnará". Sjálvur at vanda sær um orðini. At siga frá, tá ið ein av okkara politikarum ella embætisfólkum møsnar. Endiliga kunnu vit við atkvøðuseðli okkara royna at frávelja tey, sum møsna, hóast tingskipanin við kravinum um, at landsstýrisfólk ikki kunnu sita á Tingi ger, at nærum triðingurin av Tinginum er mannað við fólki, sum bjóðaðu seg fram, men sum vit júst frávaldu.

## Viðkomandi stevnumið

Næsti spurningurin er so, um tjóðini er eini framtíð lagað í nýggja heiminum. Altjóðagerð, vitanarsamfelag, upplivingarsamfelag og onnur heiti verða sett á hendan heim. **Ella eru eingir menningarmøguleikar? Telist føroyska tjóðin millum tær mongu, sum í tíðarinnar havi máttu lúta?**

Mær tykir, at tað gerst fleiri og fleiri fólkum greiðari og greiðari, hvør kósin frameftir er. Trupulleikin er, at samstundis sum myndin gerst klárari hjá alt fleiri fólkum, gerast samskiftismøguleikarnir eisini tað truplari. Eg kenni meg rættiliga sannførdan um, at millum teirra, sum hava valt "prosjektið Føroyar" liggur neyðuga vitanin um eina framtíðar kós. Samstundis søkka vit djúpari og djúpari í kyksendi – og vit megna ikki at savna hesa vitan saman í eina tjóðarvitan. Tann einstaki ynskir at dugna landi og fólki, men tann einstaki fær ikki tjóðina í talu. Sagt eitt sindur øðrvísi: **Ongantíð fyrr hevur gjógvin**



**millum tað, føroyingar vita, og tað, føroyska tjóðin veit, verið djúpari.**

Høvuðsorsøkin til hesa støðu er "Møsnará". Tí einki skilatos stendur seg í eini kapping, har vinnarin verður kosin eftir, hvussu hart ein rópar, ella hvussu nógv ein tosar.

Ynskir ein at dugna prosjektinum Føroyar, er ein háttur at dugna skili og royndunum at geva eitt íkast til felags stevnu í prosjektinum Føroyar. Ein og hvør okkara hevur møguleika til at dugna prosjektinum Føroyar við at skapa rúm fyri felags samskifti um felags stevnumið.

## Viðkomandi arbeiðshættir

Triði spurningurin er so, hvørt tað er møguligt at fáa ítøkilig prosjekt til høldar, sum saman við øðrum prosjektum tilsamans flyta okkara tilverugrundarlagi frá verandi gongd inn í ein vøkstur, har lærdur og leikur aftur fær mangar grundgevingar fyri at velja prosjektið Føroyar á síni lívsleið.

Hetta er brennandi spurningurin. Tí í fyrsta lagi eru vit einans 50.000 sálir, harav vit bert kunnu rokna við at nøkur fá tíggjutals fólk yvirhøvur hava verkliga møguleikan at gerast stigtakarar í nøkrum líkinda prosjekti. Verkligu møguleikarnir eru tengdir at tí tæri, viðkomandi persónur hevur. Initiativ er tann eini fløskuhálsurin, og útbúgving, skil, málsligur førleiki, royndir o.a. er hin fløskuhálsurin. Spurningurin er, um viðkomandi megnar at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har fólk í felag røkka settum málum, hóast óvissan er stór.

Í øðrum lagi gerst uppgávan alt størri, tess djúpari vit søkka í strategiska kyksendi. "Møsnará" økir um samskiftisuppgávuna innlendis. At vit nú í tvey áratíggju ikki hava ment okkara samskifti við útheimin kann samanberast við støðuna fyri hálvari øld síðani, tá ið nýggjur tunnil skuldi gerast til onkra fjarskotna bygd. Amboðini skulu flytast í smáum og byggjast upp aftur av nýggjum fyri hvørja einastu lítla uppgávu.

Í hesum høpi er veruleikin, at stórur partur av tí almenna er "krígsherjað øki", sum tann einstaka ætlanin ger klókt í at halda seg so óhefta av, sum yvirhøvur til ber. Í nógvum førum er tað almenna rætt og slætt ikki ein verdugur samstarvspartur, samstundis sum tað er skjótt hjá einum og hvørjum at gerast partur av einum óviðkomandi skotbardaga.

Í triðja lagi eru eisini tær funktiónirnar, sum vit hildu virka eftir ætlan, svikaligar. Tað merkir, at har eitt prosjekt í sínum ætlanum hevði gjørt nakrar metingar við støði í, at hetta og hitt virkaði heima á klettunum, bæði skal átaka sær váðan við tí, sum ikki virkar kortini, og venda sær útum landoddarnar.

Í fjórða lagi hevur heimurin sjálvur eisini flutt seg í so máta. Tað gerst alt truplari at skera eitt prosjekt soleiðis til, at tað – serliga í fyrstuni – kann handfarast við føroyskari fíggjarorku eina, givið tann váða, sum liggur í einum og hvørjum slíkum prosjekti.

Tí er tað avgerandi, at vit brúka tíð og orku til at læra okkum sjálvt høvuðsamboðið: leiðslulæruna. Tað vera hvørki útlendskar íløgur í sjálvum sær, tunnlar, gransking í sjálvum sær, flogvallir, svimjihylar ella stavrøð, sum verður mest avgerandi liðurin í prosjektinum Føroyar. Tann avgerandi spurningurin verður, hvørt vit vilja og evna at leggja okkara felags orku væl til rættis. Hitt kemur aftaná.

Tann, sum ynskir at dugna

Sosialurin